gult cyan magenta svart

Vit høvdu ikki valt ø›rvísi

– Ta› sær út til at vit eru í eini lyklastø›u. Men skuldu vit valt samgongu umaftur, høvdu vit ikki gjørt ø›rvísi, sigur Sámal Petur í Grund

VELJARAKANNING
Áki Bertholdsen

Vit hava ofta veri› í eini lyklastø›u í føroyskum politikki. Og ta› er mangt, sum bendir á, at vit koma at hava ein t‡›andi leiklut eisini í framtí›ini.

– Sámal Petur í Grund, forma›ur sjálvsst‡risflokksins, er sum so vælnøgdur vi› ta seinastu veljarakanningina, sum var› kunngjørd hóskvøldi›.

Tí hon vísir, at veljararnir hjá flokkinum taka sum heild undir vi› politikkinum hjá flokkinum, nú hann situr í samgongu í hesi avgerandi løtu í Føroya stø›u.

– Kanningin vísir, at heili 87% av sjálvst‡risfólki vilja ikki hava n‡val og ta› er ein grei› ábending um, at veljarar floksins taka undir vi› samgonguni. Og so dygga undirtøku fær ongin av hinum flokkunum í samgongu frá sínum veljarum, sigur Sámal Petur í Grund.

Annars vísir veljarakanningin, at talan er um tveir stórar blokkar, tjó›veldisflokkurin og tjó›veldisflokkurin ø›rumegin, og javna›arflokkurin og sambandsflokkurin hinumegin. Hvør blokkurin hevur um 45% av atkvø›unum.

– Enn er ov líti› kjøt á teirri n‡ggju fullveldiskósini til at fólk kunnu taka stø›u, sigur Sámal Petur í Grund, forma›ur sjálvst‡risfloksins

Tí hevur ta› stóran áhuga, hvørja lei› teir minnu flokkarnir velja, ikki minst sjálvst‡risflokkurin.



Sambandsflokkurin fær krakk

Men veljarakanningin vísir heilt greitt, at sjálvst‡risfólk geva sambandsflokkinum so dyggiliga krakk.

– Ta› er ikki ein sjálvst‡risveljari, sum sigur, at hann vil samstarva vi› sambandsflokkin, sigur Sámal Petur í Grund.

Sjálvst‡risveljarar vilja fyrst og fremst samstarva vi› fólkaflokkin (37,5 %). Hinvegin vilja gó› 16,5% helst samstarva vi› tjó›veldisflokkin og ta› sama vi› javna›arflokkin.

– Men teir flestu av okkara veljarum, 41,7 %, halda, at ta› eru fólkaflokkurin og javna›arflokkurin, sum frægast kunnu loysa máli› um framtí›arstø›u Føroya.

– Hetta samsvarar væl vi› ta› broyttu kósina í sjálvst‡rismálinum, tí har hava vit altí› veri› varnir.

– Tann broytta kósin er tí kanska meiri í samsvar vi› viljan hjá okkara baklandi.

Og hetta fær í hvussu so er ikki Sámal Petur í Grund til at skifta kós.

– Skuldi vit valt samgongu umaftur, høvdu vit ikki gjørt ø›rvísi, tí kanningin vísir eisini, at heilir 87% av okkara veljarum eru ímóti n‡vali. Ta› taki eg sum at teir eru nøgdir vi› samgonguna.

Ov líti› kjøt á

Kanningin vísir somulei›is, at fólk eru eitt sindur óviss um ta› komandi fólkaatkvø›una, sum skal vera í apríl.

Bara gó› 40 % siga, at teir fara at atkvø›a ja, men heili 17% siga, at teir vita ikki.

– Hetta vísir, at fólk eru kanska eitt sindur ørkymla›. Í hvussu so er bendir hetta á, at fólk ikki vita, hvat atkvø›ast skal um.

– Men ta› er ikki so undarligt, tí ta› er nevniliga ikki greitt enn.

– Enn er ov líti› kjøt á fólkaatkvø›uni, sigur forma›ur sjálvst‡risfloksins.

– Men samgongan skal júst brúka ta› komandi tí›ina til at fáa fulla grei›u á, hvat atkvø›ast skal um, leggur hann afturat.

gult cyan magenta svart

Tjó›veldisflokkurin fótar sær

Tjó›veldisflokkurin fær sera gott úrslit í n‡ggju veljarakanningini, men kann enda vi› lítlari ávirkan, um Sjálvst‡risflokkurin og Fólkaflokkurin heldur velja at samstarva vi› Javna›arflokkin

Tjó›veldisflokkurin klárar í n‡ggjari veljarakanning at halda fast vi› sínar veljarar, hóast fullveldisæltanin er broytt

VELJARAKANNING
Ey›un Klakstein

Hóast nógvan ágang og eina broytta fullveldisætlan, klárar Tjó›veldisflokkurin at var›eita sína stø›u sum landsins størsti flokkur.

Hetta vísir n‡ggj veljarakanning, sum Dimmalætting og Útvarp Føroya hava lati› gjørt.

Sambært hesi kanning fær Tjó›veldisflokkurin framvegis størstu undirtøkuna millum veljararnar, og flokkurin hevur framgongd sammett vi› løgtingsvali› seinast.

Sambandsflokkurin hevur størstu framgongdina - meira enn fimm prosent - og hin andstø›uflokkurin, Javna›arflokkurin, hevur eisini eina lítla framgongd.

Fólkaflokkurin missir undirtøku, men ikki so nógv sum í seinastu veljarakanningini, og Sjálvst‡risflokkurin er í somu stø›u. Mi›flokkurin hevur mist undirtøku tvær kanningar á ra›.

Ongar fylkingar at hóma

Sí›ani seinastu veljarakanningina er nógv hent á politiska leikpallinum. Samrá›ingarnar millum landsst‡ri› og donsku stjórnina koyrdu fastar, og landsst‡ri› hevur veri› noytt at broyta sína fullveldisætlan til eina meira lí›andi gongd.

– Eftir at fullveldisætlan var› broytt, hevur stórur ágangur veri› móti Tjó›veldisflokkinum, sum millum anna› hevur fingi› skoti› í skógvarnar, at hann nú skj‡tur seg inn undir heimast‡rislógina. Tí er ta› merkisvert, at Tjó›veldisflokkurin klárar at halda fast vi› sína stø›u sum størsti flokkur, heldur Jóannes Hansen, samfelagsfrø›ingur.

– Ta› kundi veri› hugsandi, at heilhjarta› tjó›veldis fóru at venda flokkinum baki og fóru at hugsa um tjó›skaparligar fylkingar eftir at fullveldisætlanin var› broytt. Men hendan kanningin vísir, at flokkurin klárar at halda upp á sínar veljarar, sigur Jóannes Hansen.

Kann vera taparin

Men hóast Tjó›veldisflokkurin fær fjór›u hvørja atkvø›u í veljarakanningini, kann ta› ikki tryggja flokkinum valdi› komandi árini.

– Spurningurin er, hvønn Fólkaflokkurin og Sjálvst‡risflokkurin helst vilja samstarva vi›. Um hesir flokkar heldur vilja hava Javna›arflokkin upp í samgonguna, so kemur Tjó›veldisflokkurin at vera taparin í so máta, hóast hann fær eitt gott val, sigur Jóannes Hansen, samfelagsfrø›ingur.

– Tá talan er um slíkan blokkpolitikk, sum vit uppliva í Føroyum nú, so koma smáu flokkarnir í eina lyklastø›u, tí teir kunnu avgera, hvør sleppur at skipa samgongu.

– Og tá er ta› áhugavert at sta›festa, at størsti parturin av veljarunum hjá Sjálvst‡risflokkinum halda, at Fólkaflokkurin og Javna›arflokkurin betri kunna tryggja eina gó›a avtalu vi› danir enn Fólkaflokkurin og Tjó›veldisflokkurin, sigur Jóannes Hansen.

Floksb‡ti ›

	Løgtingsvali›	juni 2000	kanning
A	21,3	15,5	19,2
B	18,0	26,7	23,3
C	21,9	23,7	22,2
D	7,2	4,2	5,4
E	23,8	26,4	25,3
KrF	2,5	0	0,6
Mi›fl.	4,1	3,5	3,2

Dimmalætting og Útvarp Føroya hava lati› veljarakanningina gjørt

Ríkisrættarligu vi›urskiftini hava størst t‡dning

Borgarligu flokkarnir eru huga›ir fyri samstarvi› vi› Javna›arflokkin, me›an ta› tykist vera kaldligt millum veljararnar hjá Tjó›veldisflokkinum og Javna›arflokkinum

VELJARAKANNING
Ey›un Klakstein

Veljararnir hjá teimum bá›um flokkunum vinstru megin mi›juna, Javna›arflokkinum og Tjó›veldisflokkinum, tykist líti› huga›ir fyri samstarvi.

Í n‡ggju veljarakanningini, sum Dimmalætting og Útvarp Føroya, hava lati› gjørt, eru veljararnir spurdir um, hvønn flokk tey helst vilja hava sín flokk at samstarva vi›.

Næstan helvtin av veljarunum hjá Javna›arflokkinum ynskja samstarv vi› Sambandsflokkin, 22 prosent vi› Fólkaflokkin, og einans 11% svara Tjó›veldisflokkin.

Veljararnir hjá Tjó›veldisflokkinum peika eisini fyrst og fremst á ein borgarligan flokk. Heili 60% av teimum spurdu ynskja samstarv vi› Fólkaflokkin, me›an 15% vilja samstarv vi› Javna›arflokkin.

Ynskja hvør sína loysn

– Spurningurin um ríkisrættarligu stø›una yvirskuggar ta› mesta í løtuni, og har hava Javna›arflokkurin og Tjó›veldisflokkurin hvør sína ásko›an, sigur Jóannes Eidesgaard, forma›ur í Javna›arflokkinum.

– Veljararnir hjá Javna›arflokkinum taka ikki undir vi› politikkinum hjá Tjó›veldisflokkinum, og hinvegin taka veljararnir hjá Tjó›veldisflokkinum ikki undir vi› okkara politikki, sigur Jóannes Eidesgaard.

Forma›urin í Javna›arflokkinum vísir eisini á, at ta› fer fram ein polarisering í føroyskum politikki orsaka av málinum um ríkisrættarligu stø›una.

– Tjó›veldisflokkurin og Sambandsflokkurin fáa størstu framgongdina, og ta› eru eisini flokkarnir, sum standa á hvør sínum veingi í málinum um ríkisrættarligu stø›una, sigur Jóannes Eidesgaard

Nøgdur

Hann er nøgdur vi› lítlu framgongdina hjá sínum flokki, hóast hann kundi ynskt sær størri framgongd.

– Ágangurin á Javna›arflokkin og meg hevur veri› stórur seinastu tí›ina, so hóast vit hava gjørt nógv vi› ta› hetta valskei›i›, so eri eg nøgdur vi› lítlu framgongdina, sigur Jóannes Eidesgaard.

Spurningurin um ríkisrættarligu stø›una hevur stóran t‡dning í føroyskum politikki, og hann ger, at veljararnir hjá Javna›arflokkinum og Tjó›veldisflokkinum eru líti› huga›ir í samstarvi vi› hvør annan, heldur Jóannes Eidesgaard